# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Norðurkorea hóttir heimsfriðin

Norðurkorea hevur síðstu nátt framt eina kjarnorkuspreinging, hóast stórveldini og ST ferð eftir ferð hava heitt á landið um ikki at framleiða atomvápn. Fleiri eygleiðarar hava sagt, at heimurin ikki er hin sami eftir hesa hending. Tað er sjálvsagt nakað um hetta, tí spenningurin í júst hesum parti av Asia er stórur, og eitt kjarnorkuveldi afturat ger ikki spenningin minni. Hendingin er eitt stórt afturstig fyri heimsfriðin og fyri allar royndir at bøta um trygdina í Asia og í heiminum.

Tað, sum nógv spyrja um, er, hvussu tað ber til, at Norðurkorea, sum er fátækt og sera sera illa dámt, veruliga er sloppið so langt sum at framleiða og nú royndarspreingja kjarnorkuvápn. Orsøkirnar eru fleiri. Í ártíggju er landið vorðið avbyrgt og av USA lýst sum eitt sokallað búrkroppaella yvirgangsland. Norðurkorea, sum er eitt stalinistiskt diktatur, hevur roynat koma sær burtur úr avbyrgingini, men til fánýtis. Landið hevur borið seg soleiðis at, at stórveldini vestanfyri ikki hava havt álit á stjórnini har. Clintonstjórnin var tó komin heilt væl áleiðis við royndum at fáa kjarnorkuætlan Norðurkoreas burtur. Men so kom Bush-umsitingin til, sum broytti politikk og fór undir av øllum alvi at royna at fáa sjálvt stýrið hjá Kim Il Yong burturbeint. Tá hetta gjørdist norðurkoreanska einaræðisharranum greitt, setti hann enn meira ferð á kjarnorkuætlanina, sum so nú er vorðin veruleiki: Norðurkorea er vorðið kjarnorkuveldi, eitt land, sum storveldini nú eru noydd at rokna við og at ráðføra seg við framyvir.

Tað er greitt, at henda støða kemur USA, Kina, Japan og Ruslandi sera illa við. Politikkur teirra mótvegis Norðurkorea liggur í skeljum. So ósamd hesi lond annars eru, so hava tey tó verið samd um hetta eina: Norðurkorea má undir ongum umstøðum fáa kjarnorkuvápn. Men Norðurkorea hevur í dag ikki bara kjarnorkuvápn – landið hevur eisini tær rakettir, ið skulu til og kann Norðurkorea, um landið vil, røkka eitt nú Japan við kjarnorkuloðingum um einar tríggjar mánaðir ella so. Hetta er veruliga eitt afturstig fyri trygd og friðin í Asia og í øllum heiminum. Hvørki ST ella stórveldini hava megnað at forða hesi gongd, og tí verður sera trupult at koma til sættis um málið. Stórveldini tykjast ørkymlað og ráðaleys og av somu orsøk er tað heldur ikki nógv ST fær gjørt. Samantikið ein døpur søga.

**Sosialurin**

## Minnilutir skulu verjast

**– og tey fólkavaldu eiga at ganga undan og vera verjar av minnilutum**

Vit taka hervið undir við teirri áheitan, sum Mortan Rasmussen kemur við í samrøðu við Dimmalætting um, at nú mugu hampafólk tala at teirri viðferð, sum samkynd fáa her í landinum. Viðferðin sæst aftur í lesarabrøvum og úttalilsum frá politikarum. Mortan Rasmussen hevur sum pápi at Rasmusi upplivað sonin forfylgdan av somu grund. Hvussu tað man kennast hjá Mortani Rasmussen og familjuni, at sonurin bukkar undir tí trýsti, sum er ein avleiðing av hesi forfylging, er ikki ringt at ímynda sær. Eftir okkara bestu sannføring, eigur ongin í einum framkomnum samfelag at verða forfylgdur, tí man er samkyndur.

Hampafólk eru fólk, ið nýta sítt vit og skil. Við at nýta okkara vit og skil eru vit vitandi um, at minnilutabólkar og ørðvísi hugsandi til allar tíðir hava verið útsett fyri forfylging og tí hava tørv á at verða vard. Hettar sæst aftur í lóggávu í londum rundanum okkum og sum vit fegin vilja samanberast við, og hettar sæst aftur í nationalum og internationalum yvirlýsingum.

At nevndarlimir í løgtingsins rættarnevnd halda uppá, at øll eru vard í lógini, má metast sum at sleppa sær undan at fyrihalda seg til veruleikan, bæði tann aktuella og tann søguliga, tí sum vit bæði hoyra og síggja verða samkynd, sum minnilutabólkur, ikki vard.

Tá man skal meta um eitt samfelag er gott og sterkt, eigur tað at síggjast aftur í. hvussu man fer við teimum veiku. Beint nú sær tað út til, at samkynd kunnu kenna seg forfylgd, og tí gerast tey veik. Politikarir og vit onnur kunnu veita teimum styrki við at viðurkenna, at tey hava tørv á at verða viðurkend sum ein minnilutabólkur við serligum tørvi fyri at verða vard.

Sum hampafólk er okkara hugsan, at Føroyar skal verða eitt samfelag fyri øll, at fólk eru ymiskt og Gud havi lov fyri tað. Minnilutar eiga eitt náturligt pláss í samfelagnum og við at viðurkenna tað, gerst samfelagið enn meira fjøllbroytt og rúmligt.

Starvsnevnd Javnaðarfloksins er komin við eini yvirlýsing sum fordømir ágangi ímóti samkyndum og vilja vit við hesum lesarabrævi heita á fakfeløg og onnur feløg, sum umboðandi potentiell samkynd, um at koma við eini áheitan á egnar limir og fólkavald um at verja og viðurkenna, at samkynd hava tørv á at verða vard og viðurkend.

**Katrin Andersen, Kathrina L. Joensen, Hildur við Høgadalsá og Ása Róin**

## Og skatturin ...

**HILMAR SIMONSEN**



**Skattalættin fær aftur ákoyringar. Men veruleikin er, at allir løntakarar rinda toppskatt, áðrenn vit vita av, um skattastigin ongantíð verður dagførdur. Tað er neyvan ætlanin við okkara progressivu skattaskipan.**

Í sambandi við at fíggjarlógaruppskotið fyri 2007 er lagt fram fyri almenningin, er skattareformurin aftur vorðin kjakevni. Fyrst hoyrdist formaðurin í Búskaparráðnum siga, at skattalætti kann ikki sameinast við tálman av ovurhitaðum búskapi. Síðani hoyrist formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum eisini finnast at skattalættanum og mælir heldur til at avtaka oljuavgjaldið.

Men atfinningarnar tykjast at vera í so knappar í vendingini.

Okkara progressivi skattastigi ger, at lágar inntøkur rinda lægri skattaprosent enn høgar inntøkur. Ein rindar toppskatt av seinast vunnu krónunum, tá árliga inntøkan fer upp um tað mark, sum er ásett fyri hægsta skattaprosent. Í 2006 er hetta hámark 205.000 krónur. Í Danmark, heimlandinum hjá formanninum í Búskaparráðnum, er markið fyri toppskatt 318.700 krónur!

Tað er eingin loyna, at ein vanlig arbeiðaraløn liggur sera tætt at markinum fyri føroyskan toppskatt og fer helst upp um uttan yvirtíðararbeiði. Velur arbeiðarin at arbeiða eitt sindur yvir, so verður øll yvirtíðin skattað við hægsta skattaprosenti, sum í løtuni er 34% fyri landskatt + kommunuskatt umframt onnur almenn/sosial gjøld. Tað er lítið hugaligt hjá arbeiðsmanninum ella vaskikonuni at stríðast nakrar eyka tímar um kvøldið, um meiri enn helvtin av teimum eyka vunnu krónunum enda hjá skattafaðir.

Og tað er júst hetta, sum skattalættin fer at broyta. Við skattalættanum fer at bera til hjá lág- og miðalløntum at arbeiða yvir, uttan at verða bumbað í skatti, men av tí at fjøldin av føroyskum lønmóttakarum liggur í hesum inntøkubólki, so slepst ikki undan, at lættin kostar pengar fyri landskassan.

Men tað er betur at dagføra skattastigan eitt sindur nú, so hann fylgir við lønarvøkstrinum annars, enn at blíva við at bíða til skattaskipanin er so afturúrsigld, at hon als ikki tænir sínum progressiva endamáli longur.

So kunnu vit tað sama seta proportional-skatt í gildi yvir allan kambin. Hvar er tá sosiala rættvísið?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.